# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Ullu Husgaard Hansen, Funningsfjørður

**Fødd 18. desember 1934 • Deyð 5. november 2005**

Leygarmorgunin 5. november fingu vit tey tungu boðini, at Ulla var farin, bert 70 ára gomul.

Ulla og Svend hava altíð verið so ótrúliga góð við okkum, og síðan omma í Funningsfirði doyði, hevur Ulla verið sum ein omma fyri Karl Høgna og meg. Gekk høgt uppí, hvat vit gjørdu. Var altíð klár við eini hjálpandi hond, altíð blíð og fyrikomandi, men segði lítið.

Havi altíð gingið inn til Ullu og Svend, kenni hvønn krók í húsinum. Minnist tær mongu løturnar, eg havi sitið í køkinum og spælt kort og



drukkið drekkamunn við Ullu.

Minnist allar frítíðirnar í Funningsfirði. Tá ið vit spældu í fjøruni o.a. Tá ið Ulla gav okkum drekkamunn út í tún. Einki segði hon, tá vit fjasaðu í so nógv.

Minnist tá ið hon gekk í fjørðuni, og hvussu væl hon altíð passaði bæði dunnurnar og ungarnar.Lítið vardi tað meg, at týsdagin 1. november skuldi vera síðsta ferð eg sá Ullu á lívi. Helt, at hon sá so mikið væl fyri út, at nú kundi tað bara ganga tann rætta vegin. Men so var ikki. Okkara vegir eru ikki Guds vegir.

Saknurin er stórur. Hon fylti so nógv í okkara lívi, og tað er ikki tað sama at koma inn í »Stórhús« nú.

Góðu Svend, Petra, Erland, Elna, Dávur, Svend, Jóannes, Bára, Rúna, Anja, Thomas, Sarah og Emma, tit sita við tí størstu sorgini. Mátti Jesus pápi hjálpt og styrkt tykkum í komandi tíðum.

Góða Ulla! Takk fyri alt tú hevur verið fyri Karl Høgna og meg.

Friður verið við minninum um Ullu.

**Fríðhild Louisa**

## Ein túrur í góðveðrinum



BØRN

*Orð/mynd: Snorri Brend*

**Klaksvík:** Mikumorgunin var veðrið gott í Klaksvík, - so gott, at starvsfólk í Mylnuhúsinum avgjørdu at fara ein túr í býin við børnunum í vøggustovuni.

Á myndini síggjast fýra starvsfólk og níggju børn. Starvsfólkini eru v.m.: Oda Samuelsen, Anni Vilhelmsen, Ásla Haraldsson og Eyðna Hansen.

Børnini eru: Eyðálvur, Sólvá, Eivør, Silas, Rakul, Esmar Tórur, Hans Jacob, Jónrið og Ari.

**Dagurin í morgin**

**3. februar, Blásius**, deyður umleið ár 300. Tikin av døgum fyri trúar sakir. Var biskupur í Sebaste í núverandi Turkalandi, og av tí at hann bjargaði einum smádrongi, sum hevði sett eitt fiskabein í hálsin, varð hann tilbiðin sum verndari fyri hálsverk. Dagurin var eisini róptur blámessa, og var blámessudagur stillur og klárur, boðaði tað fyri einum brúsandi vári, varð sagt.

Felagið Eysturbúgvar:

## Aðalfundur og fyrilestur um dreparasniglar

TÍÐINDASKRIV

Felagið Eysturbúgvar í Havn heldur aðalfund fríggjakvøldið 3. februar kl. 19.00 í Skansastovu, Dj. í Geilgøtu 1.

Aðalfundurin byrjar við at Dorete Bloch Danielsen heldur fyrilestur um dreparasniglarnar, ið eru eitt afturvendandi samtaluevni í býarpartinum.

Síðani verður sjálvur aðalfundurin, og kvøldið endar við eini hugnaløtu.

Felagið Eysturbúgvar varð



*Skansastova*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

upprunaliga stovnað við tí endamáli at skapa hugna og samanhald millum tey sum búgva í eysturbýnum. Stigtakarar til felagið vóru millum onnur Brandur Øssurson, Jógvan Telling Joensen og Trúgvi Hansen, sum høvdi handilin Eysturbúðina. Felagið skipar t.d. fyri tunnusláing á fastalávint, nýggjársbáli og grillkvøldi og øðrum tiltøkum á spæliplássinum.

Í nevndini í dag sita: Allan Sørensen, Sólvá Johannesen, Malan Poulsen, Johan Petur Johansen og Thorbjørn Brochs, sum er formaður. Nýggir limir eru vælkomnir at tekna seg á fundinum, og nevndin vónar, at møtt verður fjølment.

✝

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Elsu Purkhús, Klaksvík**, fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 18 heim í Betesta. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Elsu, kunnu lata eina gávu til Akurin. Konta í peningastovnunum.

Kistan við **Gunleig Poulsen, Klaksvík**, fer úr kapellinum, leygardagin 4. februar kl. 18 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður sunnudagin 5. februar kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Gunleig, kunnu lata eina peningagávu til Emmaus konta í Norðoyar Sparikassa.

**Jalgrím Herdal**, fyrrverandi Postmeistari, ættaður úr Vági, andaðist á Sjúkrahúsinum í Hillerød 1. februar, 69 ára gamal.

Kistan við **Johannu Eivindson, Nes Hvalba**, fer úr kapellinum á Suðuroyarsjúkrahúsi fríggjadagin kl. 18.í Hvalbiar Kirkju. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13. Sungið verður úr Sálmabókini. Tey, sum vilja minnast Johannu, kunnu lata eina peningagávu til Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, konta í Føroya Sparikassa.

Kistan við **Vilhelminu Hansen, Fuglafjørður**, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin 2. februar kl. 18. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar Kirkju fríggjadagin 3. februar kl. 13.

✝

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara høgt elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Gunleigur Poulsen**

Klaksvík, ættaður úr Kunoy

andaðist týsdagin 31. januar 77 ára gamal.

Farið verður úr kapellinum heim í Christianskirkjuna leygardagin 4. februar kl. 18.00.

Jarðarferðin verður sunnudagin 5. februar kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*

**Ella, Hjørdis, Dánial og Heidi við fam.**

*Tey, ið vilja minnast Gunleig, kunnu lata eina peningagávu til Emmaus. Konto í Norðoya Sparikassa.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá kæra móðir, vermóðir og omma okkara

**Marjun Skaale Dánjalsdóttir**

Runavík

andaðist og varð jarðað.

Ein serlig tøkk til starvsfólkið á B6, sum vóru um hana hennara seinastu tíð.

Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og minnisgávur.

Takk til tykkum øll, sum hjálptu til við jarðarferðina og ervið.

Eisini ein tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Dania, Hans Arni og Páll**